## Hvat vildu tit tikið við tykkum til Føroyar úr Onglandi

Tað stóra úrvalið av handlum og matstovum. 20mb internet ferð, sama sjónvarpsgjal d sum í Onglandi (umleið 1000 krónur um árið) og bíligar bilar– Sámuel.

Trø og plantir – Ingun.

## ... um Leeds United

"Ááá nei, teir eru so vánligir" – Bæði í senn. Too little too late. Eg haldi við Manchester United, og eg havi funnið út av eg skal ikki snakka hart um tað í ávísum samanhangum, tí Leeds United hevur nakar svakar fjepparar. Men tilflytarnir í Leeds hava gjørt tað at Manchester United kann góðtakast – Sámuel.

# Sakna at fólk støkka

**Ingun og Sámuel Jacobsen hava búð í Leeds í Onglandi í skjótt sjey ár. Tey væntaðu ikki at flyta aftur til Føroyar enn á sinnið, men tey hava broytt hugsan, og nú fyrireika tey seg til at flyta heim aftur á klettarnar. Sosialurin hevur sett teimum stevnu**



## Samrøða



**Ólavur Guttesen**
post@sosialurin.fo

Á kvøldi tann 11 september í 2001 vóru vinir og familja hjá Ingun og Sámuel savnað at ynskja teimum góðan byr í samband við, at tey skuldu fara til Onglands at lesa.

Sum flestu kunnugt var hetta dagurin, har stóra yvirgangsálopið í New York hendi, og júst hetta setti sín dám á kvøldið. Prátað var um tað, og sjónvarpið vísti tespuligu myndirnar av hendingini.

Bæði familja og vinir vóru bangin um tað unga nýgifta parið, sum júst dagin eftir skuldi leita sær uttanlands, men hendingin tóktist ikki at ávirka hvørki Ingun ella Sámuel.

- Tað einasta vit vóru bangin fyri, var, um hvussu tað fór at eydnast okkum at finna okkurt at búgva í, sigur Ingun, tá tey greiða frá hesari heldur undarligu fráferð.

Sjálv ferðin gekk væl, tey merktu einki til økt eftirlit á sjálvum flogvøllunum, og als ikki í Føroyum.

Fýra ár seinni, tann 7. juli í 2005, var aftur galið, tá enn eitt yvirgangsálop hendi. Hesaferð var tað í London.

Ingun og Sámuel høvdu fingið vitjan úr Føroyum, og tey høvdu sett júst henda dagin av, tá álopið hendi, at fara til London, men tann túrurin varð til einkis.

- Tað eru nógv fleiri løgreglufólk úti á gøtuni í dag enn fyrr, sum jú er ein avleiðing av álopunum, svarar Sámuel, tá hann verður spurdur um, hvussu yvirgangsálopini hava ávirkað tað vanliga lívið í Leeds.

### Fullu væl inn

Hóast hesar hendingar so hava tær ikki órógva tey bæði og teirra lestrarútbúgving.

Ingun tók eina diplom-útbúgving í design, sum er eitt grundskeið til innandura arkitekt, meðan Sámuel byrjaði uppá eina "Creative Music and Sound Technology" útbúgving á Leeds Metropolitan University.

Ingun fann útav eftir einum árið, at hon ikki vildi halda á við design útbúgvingin, og fór í staðin undir eina bachelor útbúgving í enksum og sponskum, sum hon varð liðug við á sumri 2005. Stutt eftir fullførdi Sámuel sína Masters í "Creative Technology".

Eftir lokna útbúgving fóru tey bæði eitt skifti til Coventry á bíbliuskúla, og har vóru tey í eitt ár, og síðani fluttu tey aftur til Leeds.

Ingun fór undir sína Masters útbúgving í "English Language Teaching and Materials Development" á Leeds Metropolitan University, og hon vónar at verða liðug við hana hvørja løtu.

Sámuel byrjaði at arbeiða í Carphone Warehouse, sum er ein stór handilsketa í Onglandi, sum selur fartelefon- og internethald umframt fartelefonir.

Hóast Sámuel ikki hevur nakra leiðslu útbúgving, so gekk ikki long tíð, áðrenn hann varð fluttur fram til starvsfólkaleiðara.

Ein kann kanska spyrja, hví hann ikki valdi sær eitt arbeiði innan yrkið, ið hann jú hevði lisið til. Til hetta svarar hann:

- Tey arbeiði eg leitaði eftir vóru øll sáttmálabundin, og tá vit vóru í einari støðu, har vit ikki vistu, um vit fóru at flyta úr Onglandi, so mátti eg hava okkurt, sum ikki var so bundi, sigur Sámuel.

Sosialurin